Í sambandi við at farið verður undir 3. stig í tilgongdini til eina virkissætlan fyri framtíðar orkuviðurskifti í kommunalum bygningum, metir umsitingin, at tørvur er á at seta ein arbeiðsbólk at taka sær av uppgávuni. Skotið verður upp, at fáa umboð fyri politisku skipanina og umsitingina í ein arbeiðsbólk, sum skal gera endamálsorðing í sambandi við orkupolitik fyri Tórshavnar kommunu. Eisini skal arbeiðsbólkurin gera uppskot til virkissætlan og verksetan av henni. Møguliga verður tørvur á uttanhýsis ráðgeving í sambandi við arbeiðið.

Verandi uppskot umfatar framtíðar orkuviðurskifti í kommunalum bygningum – bæði verandi og komandi bygningum. Spurningurin er, um kommunan skal víðka átakið til at fata um alla kommununa. Við hesum verður nátt heilt út til borgararnar. Støða ynskist verða tikin til um orku- klima málsetningurin eisini átti at umfata alla kommununa.

Í hesum sambandinum kann havast í huga visiónina fyri Tórshavnar kommunu, at høvuðsstaðurin verður ein vakstrardepil í Norðuratlantshavi, har kommunan m.a. vil *"at høvuðsstaðurin er burðardyggur búskaparliga, sosialt og umhvørvisliga* og Grøna skjalið, har kommuna m.a. vil leggja dent á at "*minka um orkunýtsluna, nýta minni av jarðbundnum (fossilum) orkukeldum og meira av alternativum orkukeldum",* og "*greina hvussu kommunalt virksemi kann skipast, soleiðis at kommunurnar ganga á odda viðvíkjandi orkusparing og minking av skaðiligum árini á umhvørvið*". Eisini er hetta eitt serstakt høvi til at fáa íverksett virðisorðini hjá kommuni - virðing, menning og trivnaður. Hetta í einum umhvørvissjónarhorni.

Á fundinum verður greitt frá nøkrum av átøkunum, sum eru sett í verk. Eisini verður lagt fram hvørjir málsetningar ymiskir býir hava sett sær.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at mannaður verður ein bólkur, við umboðum fyri politisku skipanina og umsitingina, at standa fyri at gera uppskot til endamálsorðing í sambandi við orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu at leggja fyri nevndina aftur til góðkenningar.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Einmælt samtykt.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa til tilmæli til fundin í heilsu- og umhvørvisnevndini 27. sept. 2011, og mæla til, at deildarleiðararnir fyri Húsaumsitingina, Byggideildina og Heilsu- og umhvørvisdeildina umboða fyrisitingina í bólkinum, og at býráðið tilnevnir 2 politisk umboð sambært §36 í kommunustýrislógini. Eitt starvsfólk úr fyrisitingini verður skrivari hjá bólkinum.

**Byggi- og býarskipnarnevndin 7. november2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Elin Lindenskov biður um málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at beina málið aftur í heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 22. november 2011:** Nevndin mælir býráðnum til, at bólkurin verður mannaður við einum umboði fyri húsaumsitingina, byggideildina og heilsu- og umhvørvisdeildina. Eitt starvsfólk úr fyrisitingini verður skrivari í bólkinum, og nevndin verður umboðað við trimum politiskum umboðum sambært §36 í kommunustýrislógini.

**Býráðið 24. november 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at velja Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal og Jan Christiansen.

**252/11** <u>**2010-0547**</u>

<u>**Fígging av ymsum eykajáttanum.**</u>

Í fíggjarætlanini fyri 2011 er roknað við nýggjari lántøku og endurfígging uppá íalt 64,4 mió. kr. Rentuútreiðslurnar av hesum eru mettar til 3 mió. kr.

Tað verður ikki neyðugt við lántøku fyri 1. januar 2012. Tískil eru rentuútreiðslurnar mettar 3 mill. kr. ov høgt.

**Tilmæli**
Mælt verður til at hækka 20910, aðrar inntøkur og lækka konto 20301, rentuútreiðslur við 3 mió. kr. og til fígging av eykajáttanum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

253/11 **2011-0800**

**Áheitan frá Viggo Christiansen, um at velja annað umboð í nevndina hjá felagnum Tórshavn.**

**Býráðið 24. mars 2011:** Samtykt at Viggo Christiansen fer úr nevndini.

**Býráðið 24. november 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at velja Bjørgfríð Ludvig.

254/11 **2010-2852 BH (sí eisini mál nr 2007-3390 og 2011-1170)**

**Skitsuuppskot: Rundkoyring við Argja Skúla á Hamrinum**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at Argja Skúli verður tikin í nýtslu eftir summarfrítíðina 2011, hevur verið arbeitt við eini ferðsluloysn á sjálvum skúlaøkinum og økinum millum nýggja skúlan og útstykkingina undir Hamrinum á Argjum. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 2007-3390, har niðurstøðan var, at vegaatkoma til og frá skúlaøkinum skal vera frá ætlaðu rundkoyringini.

Umsitingin leggur fram skitsuuppskot og fyribils kostnaðarmeting av rundkoyringini (víst verður til j. nr. 2010-2852/3 og 2010-2852/4.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við fyriliggjandi skitsuuppskoti og at rinda metta kostnaðin á 2,5 mió. kr., til liðugtgerð av rundkoyringini, av játtanini til skúlan á Argjahamri og at beina málið um mentamálanevnd og fíggjarnevnd í býráðið. Mælt verður harumframt til at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 10. februar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 9. mars 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd og mentamálanevndini.

**Býráðið 24. mars 2011:** Einmælt samtykt.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 21. juni 2011:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur boðið arbeiðið út í innbodna lisitatión millum 4 arbeiðstakarar. Lisitatión var hildin 5. juli 2011 og inn komu 2 boð. Lægsta boð hevði sp/f Andreas Berg álj. kr. 2.294.125 (u/mvg). Lisitatiónsprotokol fyriliggur í málinum, j. nr. 2010-2582/12.

Umsitingin hevur latið gera nýggja kostnaðarmeting, j. nr. 2010-2582/17, og sambært hesi meting verður fíggjartørvurin kr. 3.147.877 ella um 3,15 mió kr. Játtaðar eru 2,5 mió kr. og sostatt resta umleið kr.650.000,- í.

Sambært tí av verkætlanarleiðaranum framlagda byggiroknskapi fyri skúlan á Argjahamri, heldur samlaða játtanin fyri skúlan. Ein partur av hesi játtan er ein incitamentspulja á kr. 4.873.602, harav kommunan eigur kr. 1.949.441, sum koma til útgjaldingar frá verkætlanini, um kostnaðurin heldur.

Á hesum grundarlagi, og tí at dentur verður lagdur á at veita skúlabørnum ferðslutryggar atkomumøguleikar til skúlan verður mett, at tað er ein viðkomandi møguleiki, at nýta ein part av kommununnar parti av hesi incitamentspulju, til írestandi fíggingina til liðugtgerð av rundkoyringini.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og trivnaðarstjórin mæla til, at tikið verður av lægsta tilboðnum frá Sp/f Andreas Berg, at írestandi fíggingin á kr. 650.000 verður fíggjað av kommununnar parti av incitamentspuljuni frá skúlanum á Argjahamri og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd:** Teldupostur varð sendur til limirnar í teknisku nevnd 22. juli 2011 við fyrispurningi um teir tóku undir við tilmælinum ella ikki. Hesi hava svarað at tey taka undir við tilmælinum .

Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk og Sjúrður Olsen taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 25. juli 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 25. juli 2011:** Einmælt samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 25. juli 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Av tí at málið hevði skund at fáa samtykt og góðkent í býráðnum hin 25. juli 2011, vóru limir í teknisku nevnd umvegis teldubræv bidnir um at taka støðu til tilmælið.

Allir nevndarlimir tóku undir við tilmælinum, og samtyktin skal herviðformliga staðfestast og førast til protokoll.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Avgerðin varð staðfest av Marin Katrinu Frýdal, Jákup Símun Simonsen og Hallu Samuelsen.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Býráðið 24. november 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**255/10** **2007-2451**

**Heildarætlan fyri Tórshavnar kommunuskúla**

7. september í 2004 samtykti mentamálanevndin (mál nr. 200402108) at heita á teknisku fyrisiting um at seta ein arbeiðsbólk at gera eina heildarætlan fyri Tórshavnar kommunuskúla.

Arbeiðsbólkurin við umboðum frá teknisku deild, mentamáladeildini og skúlan hevur síðani arbeitt við eini heildarætlan fyri skúlan. Partur av grundarlagnum fyri arbeiðinum var ein støðulýsing, sum húsaumsitingin hjá kommununi gjørdi í 2005 av øllum bygningunum hjá skúlanum. Steðgur kom í arbeiðið í 2006, tí ósemja var um grundleggjandi spurningar.

Síðani er avgjørt at byrja arbeiðið á nýggjum grundarlagi við broyttari arbeiðstilgongd.

Grundarlagið arbeitt verður á er - umframt støðulýsingin frá 2005 – avgerð mentamálanevndsins um ávíst hølisstøði, tá ið um- og útbyggingar verða gjørdar í skúlunum (mál nr. 2007-0504/3).

Fyrsta stigið í arbeiðstilgongdini er, at ein arkitektur skal gera forkanningar og síðani eitt yvirskipað skitsuuppskot um, hvussu framtíðar Kommunuskúlin kann síggja út og virka. Hetta skal gerast í samráð við allar viðkomandi partar. Í hesum sambandi er ein brúkarabólkur settur við umboðum fyri skúlan og ein tekniskur

bólkur við umboðum fyri kommununa. Arbeiðs- og tíðarætlan er gjørd sum partur av sáttmálanum við arkitektin.

Miðað verður eftir, at yvirskipaða skitsuuppskotið um ársskiftið 2007/08 skal til politiska viðgerð. Síðani verður ein bygginevnd sett, og prosjektið koyrt víðari eftir mannagongdini fyri bygging hjá Tórshavnar kommunu.

Tekniski stjórin kemur á fundin at leggja fram og greiða frá upplegginum til arbeiðstilgongd og tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við upplegginum til arbeiðstilgongd og tíðarætlan og at játta kr. 600.000 av íløgum á trivnaðarøkinum til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 27. august 2007:** Tekniski stjóri greiddi frá uppleggingum til arbeiðstilgongd og tíðarætlan. Málið verður viðgjørt á fundi aftur týsdagin 28. august 2007, kl. 15.00.

**Fíggjarnevndin 29. august 2007:** Útsett.

**Mentamálanevndin 4. september 2007:** Nevndin tók undir við upplegginum um arbeiðstilgongd og tíðarætlan og mælir til at skúlin verður umboðaður í bygginevndini, tá ið hon verður sett.

Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at játta kr. 600.000 av íløgum á trivnaðarøkinum til arbeiðið.

**Fíggjarnevndin 5. september 2007:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 13. september 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Uppískoyti:**
Yvirskipað skitsuuppskot frá arkitekti og brúkarabólki verður lagt fram á fundinum.

Mentamálanevndin 3. desember 2008: Árni Winther, arkitektur, greiddi frá heildarætlanini.

**Uppískoyti:**
Á íløguætlanini fyri 2009 er roknað við at játta kr. 4.000.000 til Tórshavnar Kommunuskúla. Hetta er tó ikki viðgjørt og samtykt í nevndum og býráðnum.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta kr. 4.000.000 av íløguætlan 2009 til íløguætlan 2010 "Dagføring av skúlum" og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Sambært heildarætlanini verður Tórshavnar Kommunuskúli dagførdur innan fyri eitt áramál. Talan er bæði um eina høvuðsumvæling av høvuðsbygninginum og eina dagføring soleiðis, at hølini lúka dagsins krøv innan námsfrøði, trygd og tænastustøði. Samlaður kostnaður fyri heildarætlanina sambært Árna Winther arkitektum er mettur til uml. 90 mió kr.

Mett verður, at umvælingin av høvuðsbygninginum er so mikið átrokandi, at tað arbeiðið eigur at fara í gongd beinanvegin. Í fyrstu syftu er talan um vindeygu, klædning, bjálving, tak og ventilatión. Støða kann seinni takast til aðrar partar av heildarætlanini, m.a. nýbyggingar.

Vindeyguni eru so illa farin, at tað er neyðugt at skifta tey út nú.

Staðfest er, at inniluftin í summum av stovunum í høvuðsbygninginum ikki er nóg góð, tí hesar eru ov smáar í mun til næmingatalið. Loysnin á hesum trupulleika er, at ventilatiónsskipan verður sett upp í høvuðsbygninginum.

Umframt ventilatión eru umvælingarnar at klæða og bjálva Kommunuskúlan uttan neyðugar við atliti at at tryggja gott inniklima í skúlanum. Tær fara eisini at minka um orkunýtsluna í skúlanum.

Tá skúlin verður klæddur, verður neyðugt at gera broytingar í takinum. Takið er so mikið gamalt og slitið, at tað eigur at verða skift í samband høvuðsumvælingina.

Ein leyslig meting um kostnað bert fyri høvuðsumvæling, dagføringar, ventilatiónsskipan, byggiumsiting og óvæntað er á leið 35-40 mió kr. Høvuðsumvælingin fer væntandi at geva stórar langtíðar orkusparingar.

Eftir á kontu 4175 Dagføring av skúlum eru 1.518.000 kr. Haraftrat eru 3.588.000 kr., sum vórðu framfluttar av íløguætlanini fyri 2009, tøkar. Sambært langtíðarløguætlanini eru settar 5 mió kr. í 2011 og 15 mió kr. í 2012 av til Kommunuskúlan, tvs. í alt 25 mió kr.

Gerast skal ein ráðgevarasáttmáli um projektering og eftirlit við høvuðsumvælingini. Partur av hesum arbeiði er eisini at gera neyvari kostnaðarmeting og tíðarætlan. Sum omanfyri víst, so røkkur fíggjarkarmurin uppá 25 mió kr. ikki til alla umvælingina. Støða kann seinni takast til restfíggingina, tá ið samlað kostnaðarmeting fyriliggur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við ráðgeva um høvuðsumvælingina, og at tað av kontu 4175 fyribils verða játtaðar 5.106.000 kr. í 2010, og 5 mió kr. fyri 2011 og 15 mió kr. fyri 2012 sambært langtíðarløguætlanini.

**Mentamálanevndin 29. september 2010:** Nevndin samtykti at heimila umsitingini at samráðast um sáttmála við ráðgeva um projektering og eftirlit við høvuðsumvælingini. Partur av hesum arbeiði er at gera neyvari kostnaðarmeting og tíðarætlan, at leggja fyri mentamálanevndina aftur.

**Ískoyti**
Ráðgevin hevur gjørt eina neyvari kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri høvuðsumvælingina av Kommunuskúlanum. Hóast verkætlanin ikki tekur nýbygging við beint nú, skal atlit takast at heildarætlanini soleiðis, at tá farið verður í holt við nýbygging og dagføring av høvuðsbygninginum, verður í minst møguligan mun neyðugt at gera partar av arbeiðinum umaftur.

Í kostnaðarmetingini er alt uttandura arbeiði (útveggir, vindeygu/hurðar, tekjur), umframt nýggj lyfta og wc við høvuðstrappuna.
Møguliga verður neyðugt at gera innveggirnar nú eisini. Hetta verður kannað, og kostnaðarmeting verður gjørd.

Mett verður, at umvælingin av høvuðsbygninginum ikki kann bíða longur, tí takið er gamalt og slitið, vindeyguni illa farin, útveggirnar eiga at verða klæddir og bjálvaðir, bæði við atliti at tryggja eitt gott innikilima og at minka um orkunýtsluna í skúlanum.

Inniluftin í summum av stovunum er ikki góð, og tí er neyðugt at seta eina ventilatiónsskipan upp. Ein fullfíggjað skipan við hitaendurvinning kostar uml. 3.000.000 kr. Ein tílík skipan kann kortini ikki setast upp, uttan samstundis sum innandura umvælingar verða framdar. Verandi skipan kann tó dagførast við sjálvvirkandi vindeygaopnarum og stýring, og kostnaðurin fyri hesa skipanina er væntandi munandi minni.

Sambært tíðarætlanini verður arbeiðið sett í verk í apríl 2011 og verður liðugt við árslok 2012.

Ráðgevin leggur dent á, at valda loysnin vísir á eina arkitektoniskt rætta loysn, soleiðis at bygningurin varðveitir sína útsjónd við pussaðum fasadum og sprossavindeygum.

Bæði vindeygu, veggir og tak verða gjørd úr góðum tilfari.

Takið fær eina falsaða zinkálegging og verður sostatt matt í útsjónd. Mett verður, at tað fer at rigga væl í býarmyndini.

Tá skúlin er liðugur, hevur hann næstan somu útsjónd, sum hann hevði, tá hann varð bygdur í 1956. Hetta metir ráðgevin hava sína arkitektonisku styrki í býarmyndini.

Gerast skal ein ráðgevarasáttmáli um projektering og eftirlit við høvuðsumvælingini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við ráðgevan um høvuðsumvælingina, og í hesum sambandi at játta kr. 2 mió av kontu 4175, soleiðis at høvuðsumvælingin kann bjóðast út. Peningur er settur av til hesa høvuðsumvæling í 2010 og 2011.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Árni Winther, arkitektur, greiddi frá málinum.

Ein meiriluti: Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen og Elin Lindenskov tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Maria H. Olsen og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum, og mælir til, at miðdeildin verður bygd fyrst og at onnur stigvís ætlan verður gjørd fyri høvuðsumvælingina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Málið umrøtt og verður tikið upp aftur á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at hava felags fund fyri allar býráðslimir at viðgera framtíðar møguleikar og ætlanir við Kommunuskúlanum og skúlunum í kommununi sum heild.

**Ískoyti:**
Bogi Andreasen biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðið 24. november 2011:** Umrøtt.

**256/11** **<u>2011-1512 MM</u>**

**<u>Umsókn frá Rúna Øster vegna Petur Nolsø um byggiloyvi til uppíbygging á matr. nr. 1469 á Ternuryggi.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**

Umsókn er komin frá Rúna H. Øster, sum vegna Petur Nolsø søkir um byggiloyvi til uppíbygging av verandi húsi á omanfyri nevndu ogn.

Grundgevingin er, at Petur eigur 3 døtur og 6 abbabørn og at umstøðurnar at húsa børnum og abbabørnum eru ringar.

Ætlanin er at byggja ein uppíbygning upp á 38 m² (8,6 x 5,5 m) við forrúmi, toilett/brúsu og gestakamar.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðispartinum D1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavn, har ásetingarnar eru at umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstaka byggisamtykt fyri økið.

Økið er umfatað serstøku byggisamtyktini fyri økið fram við Hoydalsá-, undir partinum sum er avlagt til urtagarðar, ásetingarnar eru sambært gr.8 a, at á økinum skal ikki verða bygt.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Umsóknin umfatar uppíbygging í verandi hús, 5,5 x 8,6 m, ella íalt uml. 38 m², sum skal innrættast til forrúm, toilett/brúsu og gestakamar.

Økið er í almennu byggisamtyktini avlagt til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílík. Í serstøku byggisamtyktini er økið lagt av til urtagarðar.

**Frávik:**
Umsóknin inniber fylgjandi frávik:
**1)** Sambært almennu byggisamtyktini, er økið ikki lagt av til endamálið.
**2)** Sambært serstøku byggisamtyktini fyri økið fram við Hoydalsá, má ikki byggjast á økinum.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Onga fíggjarliga binding fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Hevur ikki verið hjá øðrum deildum

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Hevur ikki verið hjá øðrum myndugleikum

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2011-1512/1 og 2

Fráviksskjal, j.nr. 2011-1512/3

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at geva loyvi, vísandi til at hetta krevur ov stór frávik.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. august 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein meirluti Bogi Andreasen, Jógvan Arge, og Elin Lindenskov samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti Jan Christiansen og Levi Mørk mæla til at ganga umsóknini á møti sum frávik, vísandi til at talan er um afturatbygging í eini hús sum eru bygd áðrenn byggisamtyktin kom í gildi.

**Formaðurin vil hava hetta mál á skrá**

Umsitingin vísir á, at onki nýtt er í málinum síðani viðgerðina 22. august 2011.

**Byggi- og býarskipnarnevndin 7. november2011:** Ein meiriluti Levi Mørk, Jan Christiansen og Jákup Símun Simonsen samtyktu at ganga umsóknini á møti sum frávik, vísandi til at talan er um afturatbygging í eini hús sum eru bygd áðrenn byggisamtyktin kom í gildi.

Ein minniluti: Elin Lindenskov og Bogi Andreasen samtyktu at halda fast við samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini tann 22. august 2011.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðið 24. november 2011:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Hallu Samuelsen, um at beina málið í Byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Elin Lindenskov, Jákup Símun Simonsen, Halla Samuelsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Bogi Andreasen og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Vagnur Johannesen, Annfinn Brekkstein og Levi Mørk.

Greiddi ikki atkvøðu: Rúni Djurhuus

257/11 2011-2159

**Viðtaluhølir til 10. og 11. kommunulæknan í Suðurstreymoyar Læknadømi**
(Víst verður eisini til j. nr. 2010-1937)

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Almanna- og heilsumálaráðið játtaði fyri tið síðani at normera 10. og 11. kommunulæknastarvið í Suðurstreymoyar Læknadømi, men bíða hevur verið við at lýsa størvini leys, til kommunan hevði viðtaluhøli til taks.

Umsitingin hevur arbeitt við ymiskum møguleikum og hevur eisini verið í samráðingum við P/f. Miðlon um at leiga høli til 3 læknar á aðru hædd í Miðlon.

Ráðgevi hevur fyri útleigaran latið gera innrættingaruppskot, har serligur dentur er lagdur á møguleikar til samstarv, fakligt umhvørvi og felagsfunktiónir. Uppskotið hevur støði í høliskrøvunum sambært kunngerð nr. 64 frá 29. september 2004 um støðið, viðlíkhald, rakstur v.m. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum; álitinum um nýggja kommunulæknaskipan handað landsstýrismanninum í heilsumálum í desember 2010, har serligur dentur er lagdur á, at kommunulæknaviðtalur skulu skipast í størri eindir; og ráðgeving frá lækna um arbeiðsgongdir v.m.

Leigukostnaðurin er kr. 980 um árið. Umbyggingarkostnaðurin er mettur til kr. 3.665.500, og verður afturgoldin yvir eitt ávíst áramál.

Talan er um stórt leigumál. Mett verður tí skilabest at gera ein 10 ára leigusáttmála við møguleika at leingja hann. Mett verður eisini skilabest, at umbyggingarkostnaðurin verður afturgoldin yvir 10 ár.

Støða verður seinni tikin til, hvørjir læknar skulu fáa í boðið at flyta inn í Miðlon. Ætlanin er at kommunulæknin, sum hevur viðtaluhølir í J. Paturssonargøtu, eisini flytir í Miðlon.

Samlaður árligur kostnaður verður við hesum:

| | | |
|---|---|---|
| Leigukostnaður | kr. | 637.980 |
| Umbyggingarkostnaður v/mvg | kr. | 366.550 |
| | kr. | 1.004.530 |

Leigukostnaðurin verður prístalsviðgjørdur. Neyðugt er við hægri játtan til kommunulæknaskipanina í 2012.

Heilsumálaráðið hevur givið endaliga váttan fyri, at tveir kommunulæknar verða settir afturat í Suðurstreymoyar Læknadømi, tá hølir verða tøk til tess – tó í fyrsta lagi 1. desember 2011.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at gera 10 ára sáttmála við P/f. Miðlon um at leiga 651 fermetrar til 3 kommunulæknar

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Sosiala nevnd 20.september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjar-nevndina, at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 26. september 2011:** Útsett til nærri kanningar.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og gera 10-ára leigusáttmála um at leiga 651 fermetrar til 3 kommunulæknar.

**Býráðið fyri læstum hurðum 20. oktober 2011:** Samtykt at samráðast um 10-ára leigusáttmála um høli til tríggjar kommunulæknar, tó við teirri treyt at prísurin verður lægri enn tann í fyriliggjandi uppskoti.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samráðst bæði um leigukostnað og innrættingina. Leigumálið er til 3 kommunulæknar. Samlað er talan um 651 fermetrar, og fermetraprísurin er lækkaður til kr. 970. Árliga leigan verður 1. januar á hvørjum ári javnað samsvarandi prístalinum.

Mett verður, at parturin hjá kommununi at gjalda fyri at gera hølini klár er kr. 2,5 mió, tvs. ein fermetrakostnaður á kr. 3.840, sum mett verður er á hóskandi støði. Kommunan setir sum treyt, at útleigarin rindar møguligan kostnað, sum er omanfyri kr. 2,5 mió. Í hesum sambandi skulu lógar-, góðsku- og haldføriskrøv ásetast, og kommunan fáa byggiroknskap skjalprógvaðan.

Upprunaætlanin var at fíggja innrættingina yvir rakstur. Við at fíggja arbeiðið sum íløga, er samlaði kostnaðurin fyri 10 ára skeiðið munandi lægri. Á grein 2 er tó eingin íløgujáttan tøk til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at gera 10 ára leigusáttmála við hesum treytum, og at játtaðar verða kr. 2,5 mió sum íløga at fíggja innrættingina.

**Sosiala nevnd 15. november 2011:** Ein meirluti, Halla Samuelsen, Marin Katrina Frýdal og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina at fáa til vega játtan til íløguna.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Vagnur Johannesen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Elin Lindenskov, samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við sosialu nevnd og játta 2.500 tkr. av konto 2210 av íløguætlanini fyri 2012.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 24. november 2011:** Bogi Andreasen fór av fundi meðan mál nr. 257/11 varð viðgjørt.

Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini 16. november 2011, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Rúni Djurhuus, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein

**258/11** **2011-0341 (sí eisini mál nr. 2011-1854 og 2009-1547)**

**Tíðaravmarkað parkering í miðbýnum**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í framhaldi av viðgerð av málinum um parkeringspoltikk (mál nr 2009-1547), hevur fíggjarnevndin á fundi 19. januar 2011 m. a samtykt at heita á teknisku nevnd um beinanvegin at gera uppskot um tíðaravmarkaða parkering í miðbýnum.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur uppskot um tíðaravmarkaða parkering í miðbýnum sambært áheitan frá fíggjarnevndini 19. januar 2011 til umrøðu.

Víst verður á, at tað ikki fyriliggja upplýsingar um avleiðingar fyri møguligum størri ferðslutrýsti á veganetinum nærhendis teimum p-plássum, har tíðaravmarking verður gjørd. Er ynski um at fáa staðfest møguligar avleiðingar av hesum, er neyðugt at fáa til vega framskrivaðar ferðslumetingar.

**Ferðslunevndin 31. mars 2011:** Ferðslunevndin hevur umrøtt framlagda uppskot um tíðaravmarkað parkering (plantekning mál nr. 2011-0341/7) á hesum støðum

- P-øki á Svínaryggi
- P-øki á Skálatrøð
- P-pláss á Glaðsheyggi

- P-økið á Frúutrøð
- P-økið í Lon (við Bókbindaragøtu)
- P-økið við Skansatovu Yviri við Strond
- P-økið undir Glasheyggi

Við støði í uppskoti til Parkeringspolitikk fyri Tórshavnar Kommunu, metir nevndin tað vera neyðugt at kanna møgulig árin av størri ferðslutrýsti á kommunala vegaøkinum nærhendis parkeringsplássunum, um tíðaravmarkingin verður:

- P-øki á Svínaryggi, tíðaravmarking 4 tímar
- P-øki á Skálatrøð, tíðaravmarking 4 tímar
- P-pláss á Glaðsheyggi, tíðaravmarking 2 tímar
- P-økið á Frúutrøð, tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið í Lon (við Bókbindaragøtu) , tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið við Skansatovu Yviri við Strond, tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið undir Glasheyggi, tíðaravmarking 1 tíma

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at umsitingin kannar møguligar avleiðingar av framlagda uppskotinum um tíðaravmarkaða parkering, áðrenn farið verður undir at seta arbeiðið í verk, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Jákup Símun Simonsen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Levi Mørk, tekur undir tíðaravmarkingini:

- P-øki á Svínaryggi, tíðaravmarking 4 tímar
- P-øki á Skálatrøð, tíðaravmarking 4 tímar
- P-pláss á Glaðsheyggi, tíðaravmarking 2 tímar
- P-økið á Frúutrøð, tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið í Lon (við Bókbindaragøtu) , tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið við Skansatovu Yviri við Strond, tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið undir Glasheyggi, tíðaravmarking 1 tíma
  tó so, at tíðaravmarkingin fyri P-økið á Skálatrøð fær tíðaravmarking á 8 tímar.

**Tilmæli**
Til tess at fáa partar av málinum avgreiddar og settar í verk sum skjótast, mælir borgarstjórin til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd, við hesi broyting av pkt. 1 og 2:

- P-øki á Svínaryggi, tíðaravmarking 4 tímar at seta í verk beinanvegin
- P-øki á Skálatrøð, tíðaravmarking 4 tímar á helvtini av økinum og 6 tímar á hinari helvtini av økinum at seta í verk beinanvegin
- P-pláss á Glaðsheyggi, kannast áðrenn íverksetan
- P-økið á Frúutrøð, kannast áðrenn íverksetan
- P-økið í Lon (við Bókbindaragøtu) , kannast áðrenn íverksetan
- P-økið við Skansatovu Yviri við Strond, kannast áðrenn íverksetan

- P-økið undir Glasheyggi, kannast áðrenn íverksetan

**Býráðið 14. apríl 2011:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Sjúrður Olsen og Levi Mørk um, at tíðaravmarkingin verður:

- P-øki á Svínaryggi, tíðaravmarking 4 tímar
- P-øki á Skálatrøð, tíðaravmarking 8 tímar

ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Atkvøddu ikki: Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen.

**Ferðslunevndin 25. mai 2011:** Tikið verður undir við framløgdu uppskotum.

- Forkvinnan ynskir málið á skrá.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Nevndin samtykti at biðja umsitingina kanna møguligar avleiðingar av tíðaravmarkaða parkering á hesum plássum:,

- P-pláss á Glaðsheyggi, tíðaravmarking 2 tímar
- P-økið á Frúutrøð, tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið í Lon (við Bókbindaragøtu) , tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið við Skansatovu Yviri við Strond, tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið undir Glaðsheyggi, tíðaravmarking 1 tíma

áðrenn farið verður undir at seta arbeiðið í verk, at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um møguligu avleiðingar av tíðaravmarkaðari parkering.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2011:** Nevndin samtykti at seta soljóðandi tíðaravmarkaða parkering á hesum støðum:

- P-pláss á Glaðsheyggi, tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið á Frúutrøð, tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið í Lon (við Bókbindaragøtu) , tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið við Skansatovu Yviri við Strond, tíðaravmarking 4 tímar
- P-økið undir Glaðsheyggi, tíðaravmarking 1 tíma.

Eisini samtykt at endurskoða tíðaravmarkaðu parkeringina um eitt hálvt ár.

Samtykt varð eisini at kanna kostnaðin at gera parkeringsøki á matr. nr. 651b, Tórshavn (Pena pláss, Yviri við Strond).

**Ískoyti:**
Borgarstjórin biður um at fáa málið á skrá, av tí at málið áður er viðgjørt í býráðnum.

**Býráðið 24. november 2011:** Atkvøtt varð um tilmæli frá borgarstjóranum, um at beina málið í teknisku nevnd til tess at endurskoða býráðssamtyktina 14. apríl 2011 og samtyktina í teknisku nevnd 18. oktober 2011, tí hesar vísa seg ikki at vera nøktandi eftir ætlan, og leggja málið fyri býráðið aftur í seinasta lagi í februar 2011, ið var einmælt samtykt.

**259/11** **2011-0679**

**Uppskot til skúlabygnað**.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í álitinum Fólkaskúlin í Tórshavnar kommunu árini 2012-2021 verður skúlabygnaðurin í kommununi viðgjørdur. Skúlabygnaðurin í kommununi hevur avgerandi ávirkan á bæði íløgutørvin í verandi og nýggjar skúlar og á raksturin, serstakliga tímajáttanina til einstaka skúlan.

Skúlabygnaðurin hevur eisini avgerandi ávirkan á, hvussu undirvísingin kann skipast bæði í mun til lærugreinir, næmingar, lærarar osfr. Tað hevur í hesum sambandi stóran týdning, at skúlabygnaðurin er so skipaður, at hann stuðlar sum best undir undirvísingarliga virksemið og harvið mennir fakliga stigið.

Í álitinum er ein røð av tilmælum, sum fevna um skúlabygnaðin í allari kommununi, og sum byggja á ymisk atlit og fortreytir, ið mett verður hava størst týdning. Talan er um uppskot til ein samanhangandi bygnað, sum tí hevur ávirkan og avleiðingar fyri flest allar skúlarnar í kommununi. Samsvarandi uppskotinum um nýggja bygnaðinum setur uppskotið harumframt út í kortið, hvørjar íløgur skulu gerast komandi árini.

Størsta uppskotið er at byggja nýggjan Vesturskúla og í hesum sambandi niðurleggja Venjingarskúlan og Kommunuskúlan, og at Nám X verður sjálvstøðugur miðbýarskúli. Onnur høvuðsbroyting er at skipa forskúla í øllum skúlum. Ein triðja høvuðsbroyting er, at skúlaskiftið verður at fylgja býtinum grunddeild (1.-3. fl.), miðdeild (4.-6. fl.) og hádeild (7.-9. fl.).

Í fólkaskúlalógini § 32 er ásett, at ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi. Sambært § 47, stk. 6 ger kommunustýrið uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum, og sambært § 52, stk. 4 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum. Í

teimum kommunum, har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk at viðgera uppskot um skúlabygnað.

Álitið um nýggjan skúlabygnað deils fyri kommununa sum heild, deils fyri einstaka skúlan, verður nú at leggja fyri skúlastýrini, og settur verður arbeiðsbólkur, har kommunan og tey 11 skúlastýrini í kommununi eru umboðað. Úrslitið av hesum verður so aftur at leggja fyri nevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at álitið verður at leggja fyri skúlastýrini, og at settur verður arbeiðsbólkur umboðandi øll skúlastýri og kommununa at viðgera bygnaðaruppskotið.

**Mentamálanevndin 18. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**260/11** **<u>Val av nevndum</u>**

**Býráðið 24. november 2011:** Tikið av skrá.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:10**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Rúni Djurhuus | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |